# Ráðstevna um útbúgving



Holger Arnbjerg frá altjóða skrivstovuni var í gjár úti við stevnuplakatunum

Mynd: Jens Kristian Vang

**Markleys útbúgving. Soleiðis hava fyrireikararnir valt at kalla stóru útbúgvingarstevnuna, sum verður í Norðurlandahúsinum tíðliga í desember**

Í døgunum 5. og 6. desember verður stór útbúgvingarstevna í Norðurlandahúsinum. Stevnan er ætlað teimum ungu, sum ivast í hvørja útbúgvingarleið tey skulu velja eftir miðnámsskúlan. Á stevnuni fara umboð fyri útbúgvingarstovnar í Bretlandi, Týsklandi, Noregi, Danmark og Føroyum at greiða frá um hvørji útbúgvingartilboð teir hava at bjóða føroyskum ungum, ið ætla sær undir víðari lestur aftaná miðnámsskúlan.

Stevnan breiðir seg yvir tveir heilar dagar, fríggjadag og leygardag, og sum partur av stevnuni verður konsert hetta fríggjakvøldið í Norðurlandahúsinum, við millum øðrum Rútmiska kórinum í Hoydølum og Teiti Lassen, ið hevur játtað at koma til Føroya í sambandi við útbúgvingarstevnuna.

Í gjár almannakunngjørdi Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni, ið er ein av fyrireikarunum til stevnuna, stevnuplakatina, sum verður at síggja í øllum miðnámsskúlum komandi tríggjar vikurnar, til útbúgvingarstevnan "Markleys útbúgving" fer av bakkastokki.

# »Skúlin fyri øll – hvussu fáa vit hann«

**Ì samband við, at árið í ár er útnevnt ár teirra brekaðu, skipar Javni fyri ráðstevnu við yvirskriftini "Skúlin fyri øll — hvussu fáa vit hann"**



### Um útbúgving

Grein 3 í stevnumiðunum hjá Javna sigur, at:

- Børn og ung við menningartarni hava — sum øll onnur — rætt til skúlagongd, sum skal vera lagað til tørvin hjá tí einstaka. Hetta tilboð skal í størst møguligan mun vera í vanliga skúlanum. Serskúli skal bara brúkast í serstøkum førum, tá tørvur barnsins krevur tað.

Hóast stór framstig nógvastaðni, metir Javni, at enn er langt á mál á skúlaøkinum.

Vit hava tí fingið skúlafólk við royndum á sernámsfrøðiliga økinum úr Íslandi og Norra, umframt roynt skúlafólk her á landi at halda fyrilestrar.

Harumframt er ein hópur av skúlafólki, foreldrum og næmingum, ið sita við royndum, sum kunnu verða til gagns fyri onnur. Men bert um tað verður greitt frá teimum. Javni ynskir at fáa sett orð á bæði gott og minni gott, fyri harvið at kunna læra av royndunum.

### Fyrilestur í Studentaskúlanum á Kambsdali

Byrjað verður í studentaskúlanum á Kambsdali fríggjakvøldið við almennum fyrilestri við heitinum "Skolen for alle — ideologiske aspekter". Eftir fyrilesturin verður orðaskifti afturvið einum drekkamunni.

Tað er norðmaðurin Leif A. Fiskvik, sum fer at halda fyrilesturin.

Hann er lærari og hevur universitetsútbúgving innan búskap og leiðslu. Hann arbeiðir sum rektari á einum ungdómsskúla í Kristiansund, og hevur ymisk álitisstørv í norska undirvísingar- og granskingarmálaráðnum.

Leif hevur drúgvar royndir innan skúlaskap, og hevur serligan áhuga og royndir í tí "inkluderandi" skúlanum. Leif er pápi at 34 ára gamlari kvinnu við menningartarni og øðrum brekum. Hann er eisini nevndarlimur í systurfelagnum hjá Javna: "Norsk Forbund for Utviklingshemmede" NFU.

### Ráðstevnan á Føroya Sjómansskúla

Leygardagin verður sjálv ráðstevnan hildin á Føroya Sjómansskúla. Hon verður sett kl. 9.30 av Annitu á Fríðriksmørk, mentamálaráðharra. Seinni um dagin fer Annita at halda fyrilestur við heitinum "Framtíðarætlanir í sambandi við undirvísing av børnum við serligum tørvi".

Á ráðstevnuni fer Leif Fiskvik aftur at halda fyrilestur. Hesu ferð við yvirskriftini: "Hvad må der til, for at det skal være muligt å skape en skole for alle".

Hans Eli Dahl, lærari, serlærari og stjóri fyri alt sernámsfrøðiliga økið í Føroyum fer at greiða frá "ítøkiligum ætlanum á sernámsfrøðiliga økinum".

Íslendska Halldóra Haraldsdóttir, cand.polit, lærari og serlærari, fer at halda fyrilestur við heitinum: "Vegurin frá serskúla til vanligan skúla — hvussu loysa vit forðingar á vegnum?". Halldóra hevur verið rektari á serskúla og fólkaskúla. Nú er hon lektari á lærara- og pedagogútbúgvingunum á universitetinum í Akureyri.

### Bólkaarbeiði

Fyrilestrarnir eru grundarlag til bólkaarbeiði, sum verður seinni um dagin, har luttakararnir velja seg inn í ein bólk, til at viðgera ávís øki innan skúlan meira gjølla, við tí fyri eyga at vísa á nýtilig amboð.

Heitini á bólkunum eru

2. Fyrireikingar áðrenn barnið fer í skúla
3. Fyrstu skúlaárini
4. Seinnu skúlaárini
5. Barnið sum ikki megnar vanligan fólkaskúla
6. Samskipan av degnum — heimið, skúlin, frítíðin

Til kveikjan av orðaskifti í bólkunum hava vit fingið eitt foreldur og eitt starvsfólk at halda eitt stutt innlegg um teirra royndir. Í hvørjum bólki er eisini settur ein samskipari og ein skrivari, sum bæði eru starvsfólk.

Aftaná bólkaarbeiðið fara skrivararnir at leggja fram niðurstøður og hugleiðingar frá teimum 5 bólkunum. Til síðst verður drigið samanum.

Javni vónar og væntar at ráðstevnan fer at flyta mørk í skúlahøpi.



# Hetta er tað, sum Bill Justinussen royndi at sleppa undan at svara uppá

**Tað vóru nakrir spurningar um viðlíkahald á Landssjúkrahúsinum, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum, royndi at snúgva sær undan at svara upp á. Men nú verður hann noyddur at svara**

FYRISPURNINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum sagt í aðrari grein í baðnum í dag, royndi Bill Justinussen at snúgva sær undan at svara nøkrum fyrispurningum í Løgtinginum frá Heðini Mortensen.

Men tað nyttaði onki hjá landsstýrismanninum, tí Løgtingið tók um endan og álegði honum at svara.

Og tað vóru hesir fýra spurningarnir niðanfyri, sum Heðin Mortensen vil hava landsstýrismannin at svara.

1. Hvørja støðu hevur landsstýrismaðurin til, at starvsfólk á føðideildini á Landssjúkrahúsinum kenna seg noydd til av sínum eintingum at biðja privatar fyritøkur um fíggjarligan stuðul til viðlíkahald á deildini?

2. Metir landsstýrismaðurin, at játtanirnar á fíggjarlógini fyri 2003 og á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 til viðlíkahald á Landssjúkrahúsinum eru nøktandi?

3. Hvønn íløgutørv metir landsstýrismaðurin, at føðideildin á Landssjúkrahúsinum hevur fyri at nøkta tørvin viðvíkjandi trivnaðinum hjá mammum, børnum og starvsfólki ?

4. Um landsstýrismaðurin metir, at føðideildin hevur íløgutørv viðvíkjandi trivnaðinum á deildini, hvat ætlar hann so at gera, fyri at hesin tørvurin skal verða nøktaður?

### Eitt neyðarróp

Útgangsstøðið hjá Heðin Mortensen er brævið, sum starvsfólk á føðideildini herfyri sendu fleiri av landsins fyritøkum við umbøn um stuðul til ymsar ábøtir fyri at gera deildina hugnaligari hjá mammum og nýføddu børnum teirra.

– Hetta er eitt rættiliga óvanligt stig og skal tað uttan iva skiljast sum eitt neyðarróp frá deildini, heldur løgtingsmaðurin.

Heðin Mortensen sigur, at í brævinum til fyritøkurnar stendur, at tað sæst inni á deildini, at peningur ikki verður nýttur til viðlíkahalda stovurnar, har mammurnar liggja við teirra nýføddu børnum.

Heðin Mortensen sigur, at tað er ilt at fáa eyga á nakran samanhangandi politikk.



*– Starvsfólkið á føðideildini á Landssjúkrahúsinum hava rópt neyðarróp, sigur Heðin Mortensen, løgtingsmaður og tí vil hann hava at vita, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin í heilsumálum, hevur. Myndin er tilvildarlig*

Fyrst lækkaði samgongan heildarveitingina úr Danmark. Síðani hevur landsstýrismaðurin bjóðað grønlendingum til Føroya at fáa skurðviðgerð, tá ið nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum verður liðugur.

Hann vísir á, at samgongan hevur sett nýggjum avgjøld í gildi og hevur eisini hækkað avgjøld, sum vóru frammanundan.

Eisini verður arbeitt við at lækka rentustuðulin til sethúsabygging og at lækka útgjaldið frá barsilsskipanini. Uppgávur eru lagdar út til kommunurnar, uttan at pengar fylgja við, og mitt í øllum hesum, hoyra vit um innsavningar til bussar til bústovnar, gardinur til Landssjúkrahúsið o.s.fr.

Sostatt hevur samgongan fyrst minkað um inntøkurnar hjá landskassanum, og síðani verður rokningin send til fólkið, sum harafturat má taka stig til at halda almennar stovnar viðlíka og enntá at gera íløgur á ymsum stovnum.

Heðin Mortensen sigur, at tá ið nýggjur landsantikvarur var settur fyri einum ári síðani, var stórur dentur lagdur á, at hann kundi útvega stovninum fíggjarligan stuðul uttaneftir.

Landsstýriskvinnan í mentamálum legði so stóran dent á hesi viðurskifti, at hon vildi heldur ofra sessin, enn at lata annan umsøkjara fáa starvið.

Hann sigur, at tað má vera uppgávan hjá øllum landsstýrismonnum at syrgja fyri, at játtanin til málsøkini, teir umsita, er nøktandi, serliga í einum landsstýri, sum tosar um sjálvberandi búskap.

– Tað kann ikki vera meiningin, at almenn starvsfólk sjálvi skulu syrgja fyri at halda stovnar viðlíka og at útvega flutningstól og ananrs royna at fáa fíggjarligan stuðul uttaneftir, ímeðan politiski myndugleikin bara letur standa til, sigur Heðin Mortensen.

Vit hava meir um hetta málið á síðu 15.

# Løgmaður skal sleppa at viga Bill Justinussen

**Mikudagin royndi Bill Justinussen at forða fyri, at Heðin Mortensen slapp at seta ein skrivligan fyrispurning í Løgtinginum. Nú vil Heðin Mortensen hava at vita, um Løgmaður góðtekur slíka framferð**

FÓLKARÆÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen følir seg ikki tryggan í løgtinginum eftir framferðina hjá Bill Justinussen í Løgtinginum mikudagin og hann vil hava at vita, um Løgmaður goðtekur, at ein landsstýrismaður leggur seg beinleiðis út í arbeiðið hjá Løgtinginum*

– Hetta er eitt stórt bakkast fyri fólkaræðið í Føroyum. Og tað vil eg hava at vita, um Løgmaður góðtekur.

Heðin Mortensen, løgtingsmaður úr Sambandsflokkinum, er rættiliga illa við at tí, sum fór fram í tinginum mikudagin.

Tað, sum hann er so illa við av, er, at á tingfundinum mikudagin, royndi Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, at forða fyri at Heðin Mortensen slapp at seta honum ein skrivligan fyrispurning í Løgtinginum.

Heðin Mortensen hevur ætlað at sett landsstýrismanninum í heilsumálum, Bill Justinussen, ein skrivligan fyrispurning um umvælingar á Landssjúkrahúsinum.

Men fyri at ein landsstýrismaður skal svara einum fyrispurningi, skal Løgtingið samtykkja tað.

Hetta hevur altíð verið eitt avgreiðslumál. Tað fer soleiðis fram, at løgtingsformaðurin spyr tinglimir, um nakar hevur nakað ímóti, at ein fyrispurningur verður svaraður. Tað hevur ongantíð hoyrst eitt kis úr tingsalinum og fimm sekund aftaná hevur løgtingsformaðurin sostatt staðfest, at løgtingið hevur einmælt samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Soleiðis hevur tað altíð verið, líka síðani vit fingu nýggju tingskipanina fyri sjey, átta árum síðani.

Inntil mikudagin!

Tí tá ið Løgtingsformaðurin spurdi tingið um nakar hevði nakað ímóti at fyrispurningurin frá Heðini Mortensen til Bill Justinussen varð svaraður, hendi nakað heilt óvanligt: Óli Breckmann bað um at fáa atkvøðugreiðslu í málinum. Tað gjørdi Óli Breckmann, tí Bill Justinussen heitti á hann um at gera tað.

25 tinglimir vóru til staðar hendan dagin. Tá ið atkvøtt varð, vóru kortini 22 atkvøður fyri at fyrispuringurin skuldi svarast. Tvey tingfólk atkvøddu blankt. Tey vóru Heini O. Heinesen og Hergeir Nielsen.

Men ein tinglimur tók tað heilt óvanliga stig at atkvøða ímóti at Heðin Mortensen slapp at seta spurningin fram og tað var Charlotta á Váli Olsen úr miðflokkinum, sum hevur sætið á tingi fyri Jenis av Rana.

### Bill ein vandi fyri fólkaræðið

Heðin Mortensen heldur, at hetta málið er so mikið álvarsligt, at hann fer at reisa tað fyri sjálvum Løgmanni.

Á Løgtingsfundi mikudagin, fer hann at spyrja Løgmann, um hann góðtekur slíka framferð av einum lanndsstýrismanni.

Heðin Mortensen heldur nevniliga ikki, at hetta er so meinaleyst, sum tað kann tykjast.

– Við hesi framferðini, hevur landsstýrismaðurin beinleiðis lagt seg út í tingsins arbeiði og tað haldi eg ikki skal sleppa aftur við borðinum uttan at verða átalað.

– Tað er í álvarsliga í stríð við fólkaræðið, at ein landssyrismaður roynir at ávirka tingfólk til at atkvøða ímóti einum fyrispurningi.

– Hetta er ótrúliga langt úti, tí landsstýrisfólk hava ikki atkvøðurætt í tinginum. Landsstýrisfólk eru í veruleikanum ikki annað enn uppsitarar hjá Løgtinginum og tey eiga ikki at legga seg út í tingsins arbeiði. Men tað er júst tað, sum Bill Justinussen gjørdi. Landsstýrismaðurin hevur sagt, at hann ikki visti, hvat spurningurin var um. Hann helt, at hann var bara um brævið frá føðideildina og hann visti ikki, at hann var meiri umfatandi og snúði seg íløgutørvin frameftir.

– Hetta vísir, at hann ger ikki sítt heimaarbeiði, tí spurningurin varð lagdur fram í tinginum frammanundan, so at tingfólk vistu, hvat teir snúðu seg um.

– Og annars er tað ikki uppgávan hjá landsstýrismanninum at meta um, antin ein spurningur er ov lítil ella ov tápuligur. Tað er tingið einsamalt, sum ger av, um spurningurin skal svarast og landsstýrismaðurin hevur bara at lýða tingsins vilja og onki annað, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at fyrispurningar er einasti mátin, tingfólk hava at fáa ymsar upplýsingar frá landsstýrinum og tingfólk hava fullan rætt til at seta løgmanni og landsstýrisfólkum, spurningar.

– At Landsstýrismaðurin roynir at ávirka tingið er so langt úti, at eg vil hava at vita, um Løgmaður góðtekur slíka framferð frá einum landsstýrismanni ímóti fólkavaldum løgtingslimum. Og eg vil eisini hava at vita, hvat Løgmaður ætlar at gera við hetta, sigur Heðin Mortensen.

Vit hava meir um hetta málið á síðu 15.